## Kirkjufundur í Gøtu

Sunnudagin 26. november, sum er seinasti sunnudagur í kirkjuárinum, hittast kirkjuráðslimir, kirkjutænarar og prestar í Eysturoynni á felags kirkjufundi í kirkjuni í Gøtu.

Kirkjufundurin byrjar við gudstænastu við altargongd, har Jógvan Fríðriksson sóknarprestur, prædikar. Øll eru vælkomin til gudstænastuna. Eftir gudstænastuna hugleiðir Meinhard Bjartalíð, sóknarprestur, um sálmasang. Hugleiðingina kallar hann "Lovsyng tínum Harra - um nýggjar sálmar í gudstænastuni". Síðani verður borðhald fyri kirkjuráðslimum, kirkjutænarum, prestum o.ø. í kirkjukjallaranum, har høvi verður at skifta orð um kirkjumál.

Í fjør var eisini skipað fyri líknandi fundi í Rituvík. Ætlanin við tílíkum fundum er at umrøða kirkjumál og at styrkja og menna samstarvið millum tey, sum hava eina tænastu í fólkakirkjuni.

Í Eysturoynni eru 5 prestagjøld, 5 prestar, 15 kirkjur, 2 bønhús og 3 onnur gudstænastustøð. Kirkjuráð er til hvørja kirkju, og minsta tal á kirkjuráðslimum er 6 umframt sóknarprestin, sum er fastur limur í kirkjuráðunum í prestagjaldinum.

Roknað verður við, at uml. 130 kirkjuráðslimir og kirkjutænarar vera á kirkjufundinum í Gøtu sunnudagin.



*Hóast nógv skip hava landað í Klaksvík hesa vikuna, er ikki líkt til, at prísirnir eru fallandi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Nógvur fiskur upp á land í Klaksvík

**– Prísirnir á toski 1 og 2 hava stundum ligið omanfyri 30 krónur fyri kilo, og toskur 3 hevur ligið millum 25 og 30 krónur fyri kilo, sigur landingarformaðurin í Klaksvík, Pól Fuglø**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað vísir seg ikki at ávirka fiskaprísirnar stórvegis, at nógvur fiskur er komin upp á land í Klaksvík hesa vikuna.

– Eg havi ongantíð áður vitað um so høgar fiskaprísir yvir longri tíð, sigur Pól Fuglø, sum er landingarformaður á Landingarmiðstøðini hjá Fiskamarknaði Føroya í Klaksvík.

Hann vísir á, at hóast nógv skip hava landað í Klaksvík hesa vikuna, hava prísirnir á toski 1 og 2 javnan ligið omanfyri 30 krónur fyri kilo, og toskur 3 er farin fyri millum 25 og 30 krónur fyri kilo.

– Jú, eg má siga, at fiskaprísirnir eru í toppi, sum landingarformaðurin tekur til.

### Nógvar landingar

Mánadagin landaðu seks skip í Klaksvík.

Línuskipini, Klakkur, Núpur, Ågot, Fugltúgvan, Grani og Fiskimúli, høvdu millum 35.000 og 70.000 pund hvør.

Týsdagin landaðu fýra skip; trolararnir, Safir og Smaragd, høvdu 310 kør tilsamans, sum taka 300 kilo hvørt – og Navarin og Borgarin, sum eru fyrrverandi Polarhav og Stjørnan, høvdu 490 kør tilsamans.

Í gjár landaði línubáturin, Helena. Teir hava roynt í Eysturgrønlandi og hava landað har yviri tann fyrra túrin. Nú teir landaðu í Klaksvík, høvdu teir umleið 80.000 pund av ísfiski.

Í dag landa trý línuskip í Klaksvík.

Jákup B hevur 90.000 pund, Pison millum 60.000 og 70.000, og Froya hevur 35.000 pund.

Í morgin landar Polarstjørnan, og Pól Fuglø væntar, at teir hava millum 60.000 og 70.000 pund inni.

# KJ-Hydraulik keypir JT Electric

**Bæði stjórin í KJ-Hydraulik, Ólavur A. Olsen og maðurin aftanfyri JT Electric, Jóannes Thomsen, vátta, at JT Electric nú verður selt KJ-Hydraulik**

VINNULÍV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Ólavur A. Olsen váttar, at KJ-Hydraulik keypir el-fyritøkuna, JT Electric*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

KJ-Hydraulik á Kambsdali hevur keypt el-fyritøkuna JT Electric, sum eisini húsast á Kambsdali.

Endaliga avtalan verður undirskrivað ein av fyrstu døgunum.

Ólavur A. Olsen, stjóri í KJ-Hydraulik váttar, at felagið hevur keypt el-fyritøkuna og Jóannes Thomsen, sum er maðurin aftanfyri JT Electric sigur, at flestu viðurskifti nú eru komin upp á pláss.

Sosialurin fer at venda aftur til málið í blaðnum í morgin.

### Bygdu ov stórt

JT Electric hevur fleiri ár á baki, men síðan felagið bygdi nýggjan og stóran bygning á Kambsdali fyri fáum árum síðan, hevur raksturin verið tungur.

– Vit bygdu ov stórt og hava kent avleiðingarnar av hesum – ikki minst tí, at alingin, sum vit leveraðu nógvan útbúnað til, fór av knóranum. Vit megnaðu ikki at bera nýggja bygningin, men síðan hesin parturin fór í gjaldssteðg fyri trimum árum síðan, hava vit saman við nýggjum íleggjarum roynt at ment felagið aftur. Tað hevur gingið spakuliga uppeftir aftur. Eg haldi, at tað er skilagott, at KJ-Hydraulik nú keypir virksemið, sigur Jóannes Thomsen.

### Veitari av tøkni

Á heimasíðuni hjá JT Electric verður víst á, at felagið hevur lagt seg eftir at verða up-to-date við menning av tøkni fyri altíð at kunna veita viðskiftafólki bestu tænastuna og nýggjastu tøknina.

– Tøknin er komin fyri at vera, og næstan hvønn dag koma nýggar vørur og tænastur á marknaðin, soleiðis at arbeiðsuppgávurnar kunnu gerast lættari hjá eitt nú framleiðsluvinnuni.

JT Electric hevur verið og er veitari av tænastum og vørum til alivinnuna í Føroyum og uttanlands.

– Vit framleiða soleiðis eitt nú undirvatnsljós, kameraskipanir, stýringar og annað til alivinnuna. Harumframt veita vit tænastu til fóðurskipanir, generatorar og aðra tekniska útgerð til alivinnuna, sigur felagið á heimasíðuni.

### Ljós til Chili

Tá ið JT Electric flutti í nýggj høli á Kambsdali fyri fáum árum síðan, fingu vit upplýst, at fyritøkan longu tá hevði selt eini 500 aliljós til Chili.

Felagið framleiðir eisini PLC-stýringar til stórar og smáar uppgávur.

Vit fara sum nevnt at venda aftur til JT Electric og KJ-Hydraulik í blaðnum í morgin.